# TILTØK

## BRÚDLEYP

Leygardagin 27. desember giftast Salmina Arnoldson og Teitur Poulsen. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 16.00. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 27. desember giftast Britt Kirke Petersen, Vágur og Andrass Djurhuus, Porkeri. Vígslan sum skuldi vera í Porkeris skúla, er flutt í salin Betania kl. 14.00. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Øravík.

28. desember giftast Súsanna M. Ø. Vang og Jan Møller í Kildebrønde Kirke. Brúdleypið verður hildið fyri innbodnum í Restaurant Karlslunde Strand, Karlslunde Strandvej 87, 2690 Karlslunde.

## SILVURBRÚDLEYP

Sunnudagin 28. desember hava hjúnini Alice og Ólavur Heinesen, Leirvík, silvurbrúdleyp. Opið hús verður heima frá kl. 19.00 har øll eru hjartaliga vælkomin.

Mánadagin 29. desember hava hjúnini Minny og Magnus Jacobsen, Lopra, verið gift í 25 ár.

30. desember hava Marin og Niels Jacob Thomsen, Hvalba silvurbrúdleyp. Veitslan verður hildin í Roynhøllini 3. januar 2004 kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúdarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 375241 og 256635 áðrenn 27. desember.

Mikudagin 21. januar 2004 hava hjúnini Sólborg og Osbjørn Joensen, Skálabotn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 24. januar í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða silvurbrúdarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 441596 ella 214124 áðrenn 14. januar.

## GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 27. desember 2003 hava hjúnini Poul E. Poulsen og Kristina Poulsen, Hvalba verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

29. desember hava Poula og Magnus Ennistíg, Klaksvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin heima, saman við familjuni.

30. desember kunnu hjúnini Anna Helena og Jóan Jakku Mortensen, Tórshavn, halda gullbrúdleyp. Hövi verður at heilsa uppá tey frá kl. 11.00 til 16.00 á Lýðarsvegi 15 í Hoyvík. Døgurði fyri innbodnum verður um kvøldið.

Nýggjársaftan hava hjúnini Hanna og Karl Isaksen í Klaksvík verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin hjá døttrini á Traðargøtu 13 frá kl. 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Fríggjadagin 16. januar 2004 hava Selma og Byrger Heinesen, Klaksvík, verið gift í 50 ár. Tey ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 455441 ella 215442 innan 6. januar.

## 75 ÁR

Sunnudagin 21. desember verður Ingrid Olsen, Argir, 75 ár. Dagurin verður hildin hjá Fróða, Viðargøta 50, Argir kl. 15-20.

## PRÓGV

Tann 11. desember fingu Rúni Martinsson Djurhuus, Argir og Ingálvur Johannesen, Norðskála prógv sum kokkar á Ålborg Tekniske Skole. Lærustað Hotel Hafnia og lærumeistari Gudmundur Gudmundsson.

**Gudstænastur**
**4. sunnudag e. trinitatis**
*Gjógv:* kl. 12 messa,
*Norðskála:* kl. 17 altarg., Peter O. K. Olofson og Emil Olsen
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Heri Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11 Bjarni Bæk
*kl. 16* Jólakonsert við Kristiliga sangkórinum
*Kollafjørður:* kl. 12 Mogens Tilsted Christensen
*Hósvík:* kl. 12 Marjun Bæk
*Christianskirkjan:* kl. 11,
*Árnafjørður:* kl. 12.15, Hans Eiler Hammer
*Miðvágur:* kl. 12, David Johannesen
*Fríðrikskirkjan:* kl. 16 7-lestra gudstænasta við luttøku av kirkjukórinum undir leiðslu av Mikael J. Heinesen
*Svínoy:* kl. 12, altarg., Elsa Funding
*Dalur:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Søldarfjørður:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð

**Jólaaftan**
*Vesturkirkjan:* kl. 13.30 Bergur D. Joensen, Donsk gudstænasta,
*kl. 15* Heri Joensen,
*kl. 17* Bergur D. Joensen
*Argja kirkja:* kl. 15 Bergur D. Joensen,
*kl. 17* Heri Joensen
*Norðradalur:* kl. 13.30 Heri Joensen
*Norðskála:* kl. 17 Emil Olsen

**Jóladagur**
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Sverri Steinhólm
*Argja kirkja:* kl. 11 Bergur D. Joensen
*Kirkjubøur:* kl. 12 Heri Joensen. Talvan gongur fyri kirkjuna
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 Messa Emil Olsen

**2. jóladagur**
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Heri Joensen
*Hestur:* kl. 12 Bergur D. Joensen
*Norðskála:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa (talvan gongur fyri sunnudagsskúlan á staðnum) Emil Olsen

**Sunnudagin 28. des.**
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Heri Joensen

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 17 vit »Syngja jólini inn«.
Jólaaftan kl. 17 Jólagudstænasta.
1. jóladag kl. 11 Hátíðarmøti.
2. jóladag kl. 16 Familju jólaveitsla.
Sunnudagin 28. des. kl. 17 Almenn jólaveitsla fyri eldri.
Herbergið hevur døgnopið alla hátíðina. Gleðilig jól øll somul.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Á møtinum luttekur Lív Poulsen úr Porkeri og greiðir frá um Senegal. Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli. www.hebron.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 07.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ pater Lars Messerschmidt í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Jólaaftan kl. 11.30 Messa í Kerit. Jólanátt kl. 00.00 Miðnáttarmessa í kirkjuni.
1. jóladag kl. 11 Hámessa v/ Pater Lars Messerschmidt í Mariukirkjuni
2. jóladag kl. 11 Messa í kirkjuni
Leygardagin 27. kl. 11.30 Messa í Kerit. kl. 14.30 Jólaveitsla fyri børnini.
Sunnudagin 28. kl. 11 Hámessa og barnadópur v/ Pater Lars Messerschmidt í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Eingin sunnudagsskúli. kl. 15-18 síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 15 Jólafest, kl. 18 Møti við jólahugna.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 16.30 Syngja barnakórini uttanfyri Ebenezer, kl. 18 Sangmøti.
Jólaaftan kl. 15 Barnamøti.
Jóladag kl. 18 Útisetamøti.
2. jóladag kl. 18 Sjómansmøti.
www.ebenezer.fo

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Av tí at jólahald verður fyri samkomuna sunnumorgunin kl. 10.30, verða tey vanligu møtini avlýst. www.livdin.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Heðin Lamhauge, jólahugni aftaná.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Herluf Heinesen, Gratia syngur.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin 29. des. kl. 19.30 í KFUK: Jólafest fyri vaksin. Inngangur við Hjørleif Poulsen, lærara úr Klaksvík.
Týsdagin 30. des. kl. 17 í KFUK: Jólafest fyri várgleði, títtlingar og onnur.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnukvøldið einki møti.
4. januar aftur sum vant.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Jólaaftan Runavík tlf. 44 80 16
Jóladag Skála tlf. 44 14 90
2. Jóladag Gøta tlf. 44 10 86
Leygardagin 27. des. Eiði tlf. 42 30 06
Sunnudagin 28. des. Gøta tlf. 44 10 86

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Í jólaevangeliinum stendur, at Jesus er Harrin, Kristus.

Flestu okkara hava tað soleiðis, at onnur skulu ikki ráða yvir okkum. Vit skulu sjálv ráða yvir ferðini, uttan at onnur skulu leggja set útí, hvat vit gera.

Tí eru tað eisini so mong, ið ikki vilja hava nakað við Jesus at gera, tí hann er Kristus, Harrin, sum einglarnir søgdu jólanátt. Hann er bæði frelsari og Harri. Til foldar kom hann fyri at bjarga okkum, men eisini fyri at vera Harri í lívi okkara.

Vit duga ikki sjálvi at ráða yvir livi okkara. Tað kom longu til sjóndar, tá ið Ádam og Eva sjálvi vildu sleppa at ráða og gera nakað annað enn tað, Guð vildi. Tað førdi bara til vesældóm, neyð og deyða. Og ikki er tað vorðið betri síðani. Ongantíð spyrst nakað gott burturúr, at vit sjálvi vilja vera harrar, ella gera okkum til harrar, tað veri seg í verðsligum sum átrúnaðarligum høpi. Tað gongur útyvir bæði okkum sjálvi og onnur; tí vit eru als ikki skapaði til at ráða sjálv. Við vilja hevur Guð skapað okkum soleiðis, at vit ikki klára at liva lívið rætt við egnari megi. Vit noyðast at hava hann til Harra, hann, sum kennir allar lutir, og sostatt eisini kennir okkum at botni.

Vit vita væl, at er tað okkurt, vit ikki duga, mugu vit hava onkran at hjálpa okkum, onkran, sum hevur skil fyri tí, og, sum veit hvat tað snýr seg um. Skal eitt skip koma trygt gjøgnum skergarðin, er neyðugt við loðsi, einum, sum kennir tað vandafulla farvatnið og kann stýra skipinum trygt millum flúrar og sker. Tað er ikki vísdómur, um skiparin ikki vil hava loðsin umboðr, tí honum dámar so væl at stýra sjálvur! Tað kunnu hvørki hann ella tey, ið eru við umborð, vera útsett fyri. Tí tað endar galið.

Jamen soleiðis er eisini við mannalívinum. Tað er stór misfatan at halda, at tað er nakað, ið vit hava skil fyri og klára sjálvi. Vit vita alt ov lítið um lívið, og vit duga alt ov lítið í lívinum.

Tí er tað ein stór gáva og ein stór gleði, tá ið tað verður sagt við okkum: Hann er Kristus. Harrin! Betri Harra fáa vit ikki. Tí hann bæði kennir okkum og veit hvar skal møta okkum. Hann veit veg gjøgnum alt samalt, ja, hann er vegurin heilt inn í Guðs ríki.

Gleðiliga høgtíð.

Amen.

**John S. Myllhamar, trúboðari**



# TILTØK

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Saron, Vestmanna**
Í kvøld kl. 20 Jólahugni fyri samkomuni.
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti. Telefonandaktin 424741. Vælkomin í Saron.

**Miðvágs missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og møti kl. 18, Niels Jacob Nielsen, trúboðari talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 16 Jólafest fyri børnum undir skúlaaldur. Barnakórið luttekur. Kl. 18 jólafest fyri børnum í skúlaaldri.
2. jóladag kl. 18 Møti.
Sunnudagin 28. kl. 18 Jólaveitsla fyri vaksin. Eingin sunnudagsskúli.
Nýggjársdag kl. 18 Møti. Eingin sunnudagsskúli. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.jesus.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Pola Jacobsen. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Osbjørn Joensen, Anju og Vagn í Geil. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti hevur jólahugna leygarkvøldið kl. 21. Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor og møti verður kl. 18.

**Missiónshúsið, Leirvík**
Einki ungdómsmøti og sunnudagsskúli. Møti verður sunnukvøldið kl. 18, andakt og syngja jólasangir.
Jólafestin 27. des. kl. 19.00.
28. desember kl. 16 Jólatræ fyri yngri børn og kl. 19 eldri.

**Betesda, Norðoyggjar**
Sunnudagin kl. 11 Minnismáltíð Harrans, kl. 12.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 yngra kvartettin hevur evangel. sangløtu við góðum felagssongi og kvartett. Talarar: David Lukama og Rógvi Joensen.

**Samkoman Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 11 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 **Sangmøti**, kl. 21 Ungdómsmøti, Jólahugni. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo







**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Dánial á Dul, kl. 18 Einki møti. Vælkomin í Betania.

**Sandoy**
Leygarkvøldið 27. des. kl. 20 verður Evangel. fundur í Samljóð í Skopun.
Sunnukvøldið 28. kl. 20 Evangel. fundur í Sólarris í Húsavík.
Mánakvøldið 29. des. kl. 17 Evangel. fundur í Virkinum á Sandi, kl. 20 Fundur í Kelduni í Skálavík.
Týskvøldið 30. des. kl. 20 verður Evangel. fundur í Eiriksgarði í Dali. Talarar: Levi Joensen o.a. Eftir fundirnar bjóða vit kaffi og børnini fáa pakka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Salem á Tvøroyri**
Fundur við sangkórinum verður sunnudagin kl. 16.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti við jólahugna. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 16 Jólaveitsla fyri børnum í øllum aldri.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Árna Kjærbeck og Jacob Poulsen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti.
Sunnukvøldið 28. des. kl. 19 Jóla- og sjómansveitsla. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Porkeri**
Jólaveitsla fyri børn verður leygardagin kl. 16.
Fundur við sangkórinum verður sunnukvøldið kl. 20.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskur fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.
1. joladag kl. 18 Evangeliskur fundur.
2. jóladag kl. 18 Evangeliskur fundur.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Kirstein og Noru Stórhamar. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti, okur syngja jólini inn, Fredrik Joensen talar.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøld kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, ein
s og bløðini eru til taks.
*Hósdagin 18. desember*
kl. 14-17.00 Jólahugni
*Fríggjadagin 19. desember*
kl. 10-17 Jólahugni
**Tilhaldið er stongt frá 23. desember til 5. januar 2004.** Vit ynskja øllum eini góð og hugnalig jól og takka fyri tað skjótt farna.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
*Hósdagin 18. desember*
kl. 17 Jólahugni í Kvinnufelagshúsinum
**Jólafrí til 5. januar 2004.**
Vit í Fløvanum ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár, við tøkk fyri tað farna.

*Eins og vanligt er, verður byrjað við einum Guðs orði, og framvegis eru luttakararnir vælkomnir at taka eitt og hvørt ítriv við sær, eitt nú stokkar o.a. Bløðini eru til taks í Fløvanum.*
*Serflutningstænastan v/ Andreas Poulsen er byrjað. Hava tygum tørv á koyring, ringið vinarligast tlf. 448051.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
Mikudagurin 17. des. er seinasta dagur Tilhaldið er opið undan jólum. Vit hittast aftur mánadagin 5. jan. í komandi ári. Gleðilig jól og eitt gott komandi ár.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, miku- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 20.12. kl. 14[00]
Leygardagin 20.12. kl. 18[00]
Leygardagin 20.12. kl. 22[15]
Sunnudagin 21.12. kl. 14[00]
Sunnudagin 21.12. kl. 18[00]
Sunnudagin 21.12. kl. 22[15]




Leygardagin 20.12. kl. 18[30]
Sunnudagin 21.12. kl. 17[15]




Leygardagin 20.12. kl. 23[00]
Sunnudagin 21.12. kl. 21[45]




Leygardagin 20.12. kl. 20[45]
Sunnudagin 21.12. kl. 19[30]




**Billettprísur: 45,- kr.**
Leygardagin 20.12. kl. 16[00]
Sunnudagin 21.12. kl. 15[00]

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**